## Fiskalivur skal aftur á borðið

Tað økir ikki um vandan fyri krabbameini at eta livur. Hetta staðfestir ein nýggj norsk frágreiðing, sum NILU (Norsk Institut for luftforskning) hevur luttikið í. Fiskalivur hevur gjøgnum langar tíðir verið ein vanligur partur av døgurðaborðinum, serliga í smáum fiskivinnusamfeløgum. Livur úr fiski hevur verið ein týdningarmikil kelda til D-vitaminur - ikki minst í teimum økjum, har vetrarmánaðirnir eru langir og myrkir, og lítið sólarljós er.



## Fiskiveiðieftirlitið svíkur

Ein ES-frágreiðing sigur, at danskir fiskimenn fiska meira tosk, enn teir hava loyvi at fiska. Frágreiðingin sigur nevniliga, at meirveiðan hjá dønum er upp í heili 13%. Men formaðurin í Danmarks Fiskeriforening, Flemming Kristensen, er ikki samdur við ES-frágreiðingini um, at fiskimenn einsamallir eiga at ábyrgdast fyri hetta. - Tað er fiskiveiðieftirlitið, sum hevur skyldina í hesum, tí tað er ikki altíð so lætt hjá fiskimonnum neyvt at staðfesta, hvussu nógvan fisk teir hava inni, sigur Flemming Kristensen.

# Skrøna at døglingur hevur



*Sambært keldum, eiga vit føroyingar veiðitøl fyri døgling heilt aftur til 1584, sum er fimm ár fyri, at Magnus Heinason varð tikin av døgum í Keypmannahavn í 1589*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

**Gamalt er, at døglingur bara skal hava eitt eyga, men hetta er søgn, sum ikki hevur hald í veruleikanum. Og tó. Jákup Kjærbo í Sandvík sigur, at vinstra eygað á døglingi liggur líka sum afturlatið, og haðani kann søgnin koma um, at døglingur bara hevur eitt eyga**

DØGLINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Enn einaferð løgdu nakrir døglingar beinini í Sandvík og vórðu skornir upp í Hvalba.

Flestu døglingar, sum eru deyðir í Føroyum, er antin deyðir í Hvalba ella Sandvík.

Hvalurin hoyrir til nevhvalirnar, ið hava - sum navnið sigur – nev. Teir hava eisini tenn, men tennirnar eru lítið at tosa um.

Fólk vita sum heild lítið um nevhval, ið er lítið kendur millum manna.

Og kortini er "nevið" so eyðkent.

Døglingur er betri kendur í Hvalba og Sandvík enn aðrastaðni í landinum, tí tað er so ógvuliga sjáldan, at hvalur av hesum slagi endar uppi á landi aðrastaðni enn júst í hesum bygdum.

Tað er serliga um heystarnar, at døglingar kunnu enda uppi á sandinum í Hvalba og Sandvík. Viðhvørt eru ár ímillum, men fara vit longur aftur í tíðina, var hetta ikki nøkur sjáldsom sjón.

Nú tríggir døglingar aftur løgdu beinini í Hvalba, fingu øll í sóknini ein bita at koyra í pottin!

### Gomul hagtøl

Sambært keldum, eiga vit føroyingar veiðitøl fyri døgling heilt aftur til 1584, sum er fimm ár fyri, at Magnus Heinason varð tikin av døgum í Keypmannahavn í 1589.

Hetta eru sostatt gomul hagtøl.

Døglingur, sum deyður er í Føroyum, hevur ligið úr 3,50 og upp í 11,30 metrar.

Døglingalýsi var tiltikið til ymiskt grøðandi endamál, og spikið skal vera ógvuliga feitt - og ikki etandi.

Í gomlum døgum hildu fólk - sum ikki høvdu sæð henda nevhval - at døglingur bert hevði eitt eyga. Men hetta er ikki so.

Slíkt livir bert í sagnum – og tó, kunnu vit siga.

Søgn er um risa og mykinesmann. Tá illa stóð til hjá risanum, og tap var í hendi, legði hann seg at biðja fyri lívinum. Eitt av trimum lyftum, sum risin gav mykinesmanninum, var, at hvørt ár um hoyna skuldi hin stóri hvalurin koma í Hvalagjógv.

Mykinesmenn gloymdu, at teir ikki máttu siga nakað ilt um hvalin. Teir spottaðu døglingin, tí hann skuldi bara hava eitt eyga.

Hvalurin hvarv úr Hvalagjógv og kom ikki aftur hagar, men legði nú leiðina inn á Hvalba og Sandvík.

### Smáir døglingar

Jákup Kjærbo í Sandvík sigur, at døglingarnir, sum hesaferð gjørdu landgongd í Sandvík, vóru av teimum smáu, sum teir plaga at siga.

- Eg haldi, at tann størsti var einar 6 metrar langur.

Jákup sigur, at seinast hann skar tríggjar døglingar á háls í Nesi í Hvalba, var tann størsti longri enn 9 metrar. Hinir báðir vóru einar 6 og 7 metrar langir.

- Hetta er eitt ógvuliga sterkt kríatúr, og sveivurin situr øvutur av tí, hann situr á vanligum grindahvali. Tí liggur døglingur á liðini, tá hann kemur at landi og er soleiðis ringur at skera á háls. Tú skalt langt niður við knívinum, áðrenn tú kemur niður á mønina, og tá hvalurin ger mønubrest, kleimur hann tvøstið fast tvørtur um arm á tær. Hetta skaðar ikki, men tað kann kennast eitt sindur óbehagiligt. Hinvegin søgdu teir gomlu, at tú ikki mást koma í klemmu millum geiðslarnar við fingrunum, tá tú skert á háls.

Jákup sigur, at teir gomlu høvdu serligar døglingaknívar, sum vóru einar 60-70 sentimetrar langir.

- Tá eg havi skorið døgling á háls, havi eg brúkt ein